LØGTINGIÐ

Jóannes Eidesgaard, løgmaður
Løgmansskrivstovan
Postrúm 64
110  Tórshavn

Uttanlandsnevndin

**24. juni 2008**
**j. nr. 7.172-20080002[3] ks/td**
(at tilskila í svari)

Sagt verður frá, at soljóðandi skriv í dag er sent Uttanríkisráðnum, att: Høgna Hoydal, landsstýrismanni, Postrúm 64, FO-110 Tórshavn:

**“Viðvíkjandi ásetingum í lóg um Grønlands sjálvstýri**

Við skrivi, dagfest 3. mai 2008, hava tygum vent tygum til Uttanlandsnevndina fyri at ráðføra tygum samsvarandi § 54 í stýrisskipan Føroya, áðrenn tygum í næstum eftir ætlan fara at taka hetta mál upp við grønlendska uttanríkisráðharran, til tess at fáa eina frágreiðing um málið og at umrøða, hvørjir møguleikar eru at broyta § 12 í uppskotinum til lóg um Grønlands sjálvsstýri.

Tygum hava eisini sent Uttanlandsnevndini samandrátt av álitinum frá grønlendsku-donsku sjálvstýrisnevndini um sjálvstýri í Grønlandi.

Í hesum sambandi var fundur millum tygum og Uttanlandsnevndina tann 9. juni 2008, og hevur Uttanlandsnevndin eisini havt fund við løgmann um málið tann 16. juni 2008.

Uttanlandsnevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í tríggjar minnilutar.

**Ein minniluti** (Jenis av Rana, Olga Biskopstø og Bergtóra Høgnadóttir Joensen) leggur dent á, at tað má galda ein grundregla, sum sigur, at føroysk viðurskifti ikki kunnu leggjast fyri fólkið í Grønlandi at taka støðu til. Hetta eigur tó á ongan hátt at leggja forðingar fyri tí sjálvstýristilgongd, ið ynski er um at fáa í lag fyri Grønland.

Við hesum viðmerkingum hevur minnilutin gjørt av at taka undir við, at tygum taka hetta mál upp við grønlendska uttanríkisráðharran. Minnilutin tekur eisini undir við, at løgmaður samsvarandi síni frágreiðing á fundinum við Uttanlandsnevndina umrøður málið á ríkisfundinum, sum verður í hesi vikuni. Minnilutin heldur tað sostatt vera umráðandi, at málið verður umrøtt við bæði danskar og grønlendskar myndugleikar fyri stundisliga at mótmæla, at føroysk viðurskifti verða nevnd í grønlendsku sjálvstýrislógini, men soleiðis at landsstýrið sjálvsagt má samskipa tey stig, sum landsstýrið umhugsar at taka í hesum málinum.

**Ein annar minniluti** (Bjørn Kalsø, Jørgen Niclasen og Kári á Rógvi) heldur málið vera sera týðandi. Uppskotið um Sjálvstýrislóg Grønlands hevur fleiri ásetingar, ið viðkoma Føroyum, umframt at Føroyar og ríkisrættarliga støða Føroya verða viðgjørd á mongum støðum í álitinum hjá donsk-grønlendsku tingmannnevndini, ið hvørki hevur givið føroyskum fólkavaldum ella

Føroya landsstýri høvi at gera sínar viðmerkingar.

Serliga er óheppið, at henda lóg, ið er at meta sum Stýrisskipan Grønlands, og ætlandi fær serliga støðu, sum staðfest á fólkaatkvøðu, beinleiðis nevnir Føroyar, umframt at óbeinleiðis verður sagt, hvør rættarstøða Føroya er í uttanríkismálum. Rættarstøða Føroya má kunnu mennast og betrast, uttan at neyðugt skal vera at broyta grønlensku stjórnarskipanina við fólkaatkvøðu. Broyting av føroyskum viðurskiftum mugu undir ongum umstøðum krevja fólkaatkvøðu í Grønlandi.

Minnilutin vil sjálvsagt ikki leggja seg út í sjálvstýristilgongd grønlendinga, men tjóðirnar báðar hava viðurskifti við sama ríki, tí eiga vit bæði at samskifti við grønlendingar og ansa eftir, at óheppin fordømi ella skeivar lýsingar av støðuni ikki skaða áhugamál hvør hjá øðrum.

Minnilutin hevur tó ta fatan, at sera umráðandi er, at støða Føroya úteftir er væl og virðiliga samskipað. Løgmaður, ið varðar av stjórnarskipan og ríkismálum, eigur í fyrsta lagi at taka málið upp á ríkisfundi við grønlendsku og donsku stjórnarleiðararnar, grundað á gjølliga viðgerð á landsstýrisfundi.

Eftir viðgerð og samskipan í landsstýrinum og eftir samskifti á hægsta politiska stigi, eigur landsstýrismaðurin í uttanríkismálum at samskifta við grønlendska starvsbróðir sín út frá greiðu felags støðu lansstýrisins.

Minnilutin heldur loksins, at nú danskir og grønlendskir politikarar hava samskift um hesi mál í fleiri ár, eiga stig at verða tikin, so grønlendingar fáa høvi at hitta føroysk fólkavald at umrøða ríkisrættarligu støðuna og stjórnarrættarligar møguleikar og mannagongdir.

Minnilutin væntar, at Uttanlandsnevndin verður áhaldandi kunnað og spurd um málið.

**Ein triði minniluti** (John Johannessen) viðmerkir, at eftir sannføring minnilutans er tað rættiliga avgerandi í hesum føri at gera greitt, hvat fyri mál, ið Uttanlandsnevndin hevur til viðgerðar. Talan er um eitt skriv frá Høgna Hoydal, landsstýrismanni, dagfest 3. mai 2008, har hann biður um ráðførslu við Uttanlandsnevndina í sambandi við, at hann ætlar at taka upp samband við grønlendska uttanríkisráðharran at fáa eina frágreiðing og mótmæla, at føroysk viðurskifti verða umrødd í álitinum frá grønlendskt/donsku sjálvstýrisnevndini og serliga í uppskotinum til grønlendska sjálvstýrislóg § 12, stk. 2 og 7, har tað eisini ítøkiliga verður lóggivið um Føroyar.

Vísandi til, at hetta málið ikki er eitt uttanríkismál, men eitt mál viðvíkjandi “yvirskipaðu viðurskiftum Føroya mótvegis Danmark”, mælir minnilutin frá, at málið verður tikið upp á hendan hátt. Talan er um eitt mál, sum løgmaður fyrisitur sambært málsbýtisfráboðanini § 3 um “yvirskipaðu viðurskifti Føroya mótvegis Danmark”. Í Danmark og Grønlandi verða málini somuleiðis fyrisitin av ávikavist forsætismálaráðharranum og landsstýrisformanninum. Tað er skeivt, og eigur at verða mælt frá, at landsstýrismaðurin í uttanríkismálum tekur upp samband við sín grønlendska starvsfelaga um málið, tí hvørgin teirra situr fyri umrødda máli. Slíkt samband fer bert at føra við sær ørkymlandi boð um, hvør almenna støðan er.

Á fundi við Uttanlandsnevndina 17. juni 2008 upplýsti løgmaður, at sambært heimastýrislógini § 7 er tað lógarkrav, at danir senda føroyingum til ummælis § 12, stk. 2 og stk. 7 í uppskotinum til grønlendska sjálvstýrislóg, áðrenn uppskot verður lagt fyri Fólkatingið. Málið verður tá alment tikið til viðgerðar og harvið eisini lagt fyri Løgtingið eitt uppskot til ríkislógartilmæli, har vit skulu taka støðu til orðingarnar av § 12, stk. 2 og 7, ið viðvíkja Føroyum.

Á sama fundi í Uttanlandsnevndini upplýsti løgmaður – eins og flestu nevndarlimunum kunnugt – at orðingarnar í § 12, stk. 2 og stk. 7 í uppskotinum til grønlendska sjálvstýrislóg ikki broyta rættarstøðuna í Føroyum. Hesi viðurskifti eru longu galdandi lóggáva í Føroyum sambært uttanríkispolitisku heimildarlógini § 1, stk. 2, 2. pkt og § 2, stk. 1, 2. pkt.

Løgmaður upplýsti, at hendan sonevnda DFG skipan var ein skipan, sum føroyingum ongantíð hevur dámt, men treyðugt eru gingnir undir, sum umstøðurnar vóru. Men samstundis vísti hann á, at landsstýrið vil leggja nógv fyri, fyri at fáa hesa skipanina broytta, soleiðis at Føroyar og Grønland virka sjálvstøðugt í altjóða samstarvi og ikki tvungið tvinnað saman.

Samanumtikið mælir minnilutin til, at løgmaður longu á ríkisfundinum í hesi vikuni eigur at viðgera málið saman við danska forsætismálaráðharranum og grønlendska landsstýrisformanninum. Løgmaður eigur at skjóta upp, at § 12, stk. 2 og stk. 7 verða orðaðar soleiðis, at Føroyar ikki verða nevndar í greinunum. Ásetingar Føroyum viðvíkjandi mugu vera í føroyskari lóggávu og ikki í grønlendskari. Tað kann ikki vera rætt, og liggur ávísur vandi í, at reglur Føroyum viðvíkjandi skulu samtykkjast á grønlendskari fólkaatkvøðu. Tað er einans føroyska fólkið, sum við fólkaatkvøðu kann greiða atkvøðu um føroysk viðurskifti.

Minnilutin heldur eisini, at løgmaður eigur at gera forsætismálaráðharranum greitt, at fyrireikandi skjølini til grønlendsku heimastýrislógina í 1978 og nú grønlendsku sjálvstýrislógina á ongan hátt kunnu brúkast til at tulka stjórnarskipanarviðurskifti ímillum Føroyar og Danmark. Hetta tí, at fyritreytirnar fyri hesum báðum lógum eru heilt hvør sínar, eins og føroyingar ongan lut hava – og heldur ikki áttu at havt – í arbeiðinum at dagføra grønlendsku stýrisskipanina.

Harumframt eiga vit at leggja okkum í geyma, at føroyingar á ongan hátt mugu leggja forðingar fyri tí sjálvstýristilgongd, ið ynski er um at fáa í lag fyri Grønland. Tí eiga løgmaður og føroyskir myndugleikar annars at fara varisliga um í sambandi við hetta mál.

Avrit av hesum skrivi er sent løgmanni til kunningar.”

N.v.

Jenis av Rana
formaður